## Bowyer er svínskur

Fyrrverandi føroyski landsliðsleikarin, Claus Bech Jørgensen, hevði verið á vøllinum í eitt korter, tá hann varð útvístur í FA-CUP dystinum móti Birmingham um vikuskiftið. - Í einum mótálopi varð eg sligin og sparkaður av Lee Bowyer, sum síðan hálar meg niður. Í eini roynd at sleppa upp fái eg eitt knæ í høvdið. Eg kendi meg noyddan at steðga honum við at hála í troyggjuna, so hann ikki gjørdi tað aftur og fekk mál, sigur Claus Bech Jørgensen við tipsbladet.dk. Hann leggur afturat, at felagið stuðlar honum. - Bowyer er ein svínskur leikari, sum tú skal ansa eftir. Tílíkt hendir í hvørjum dysti, og tíverri sá dómarin hetta sum eina hevnissøku, sigur Claus Bech Jørgensen við tipsbladet.dk.



## Afrikani royndarvenur á Argjum

22 ára gamli Tehe Aristide av Fílabeinsstrondini roynir í hesum døgum at spæla seg til sáttmála hjá AB. Tað skrivar heimasíðan hjá argjamonnum. Tehe Aristide, sum vanliga er miðverji, er 22 ára gamal og 190 cm høgur. Hann hevur áður spælt fótbólt á Fílabeinsstrondini og Italia. Sambært heimasíðuni vónar hann, at AB fær brúk fyri honum í komandi kappingarári.

# Trý steyp í danskari bogaskjótikapping



*Frá vinstru: Jógvan Magnus Andreasen, Vágaskot, Connie Hansen, Rønne og Torfinn Hansen, Vágaskot. Sostatt fingu báðir vaksnu skjúttarnir úr Føroyum heiðurstekin*

**Um vikuskiftið var kappingin um Fredriksborg steypið í Hillerød í Danmark. Tríggir føroyskir skjúttar luttóku, og øll fingu heiðursmerki við til Føroyar. Talan er um tvær silvur og eina bronsu**

BOGASKJÓTING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Frederiksborg Pokalen, sum kappingin verður nevnd á donskum, er í Hillerød í Jútlandi á hvørjum ári.

Í ár vóru vaksnu recurve-skjúttarnir, Jógvan Magnus Andreasen og Torfinn Hansen, báðir úr Vágaskoti, við til kappingina, umframt, Sirið Rein úr Tambum úr Havn í kadettbólkinum, sum eru ung millum 13 og 16 ár.

Vanliga eru bestu skjúttarnir í Danmark við til hesa kappingina, tí hetta er seinasta freist til úttøkuna til EM og HM-kappingar.

### Silvur og bronsu

Millum tey vaksnu luttóku Jógvan Magnus Andreasen og Torfinn Hansen. Báðir luttóku í triðsterkasta bólkinum.

Við ávikavist 520 stigum hjá Jógvani Magnusi og 504 stigum hjá Torfinni, megnaðu teir báðir at fáa heiðursmerki í kappingini. Jógvan Magnus vann silvur og Torfinn vann eina bronsu.

Eftir at innleiðandi kappingin hevði verið, varð hugt eftir stigunum yvir alla kappingina. Við sínum 520 stigum var Jógvan Magnus Andreasen klárur til finalu-umførini. Har møtti føroyski skjúttin einum donskum elituskjútta og tapti dystin við níggju stigum.



*Frá vinstru: Emma Rosander, Trelleborg, Tanya P. Sunding, Hillerød og Sirið Rein, Tambar. Sirið var einasti føroyski ungdómskjútting, men ikki sveik hon álitið*

### Silvur til ungdómin

Sirið Rein var einasti føroyski ungdómsskjúttin til kappingina. Hon hevði sum tann einasta fylt treytirnar fyri luttøku.

Hóast hon var einsamøll, sýntist hetta ikki ávirka hana. Hon gjørdist nevniliga nummar tvey millum genturnar í sínum bólki við 501 stigið.

Vinnarin hjá gentunum í hesum bólki fekk 22 stig fleiri enn Sirið Rein.

## Kappaðust í mountain-bike

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Í ársins fyrstu súkklukappingin bleiv kappast á fjallasúkklu. Børnini kappaðust í trimum bólkum og so bleiv kappast millum vaksin eisini.

Ein genta luttók og í hennara bólki gjørdist hon fyrr á mál enn dreingirnir í hennara bólki. Durita Toftum Joensen var gott koyrandi leygardagin, eins og hon eisini hevur verðið í øðrum kappingum, ið TSF hevur skipað fyri. Hon hevur tað ikki frá fremmandum. Pápin, Andrass Joensen, hevði eisini ein góðan dag leygardagin, og kom á mál bert eitt minutt eftir vinnaran í kappingini hjá teimum vaksnu.

Sera spennandi var í kappingini millum dreingir 12 til 14 ár. Ikki tí, Benjamin Thomassen, ið nú hevur drúgvar royndir sum súkklari, vann sera trygt, men kappingin um 2. plássið gjørdist spennandi sum kappingin leið. Jørtur B. Poulsen og Niels Gilstein Midjord stríddust um hetta pláss. Tætt var, men á seinasta umgangi fór Jørtur frá Niels Gilstein, og gjørdist tí næstur á mál.

Eisini Bartal Dam Gregoriussen hevur verið trúgvur til kappingar hjá TSF, og eisini hann slapp at njóta løtuna ovast á sigurspallinum eftir loknan dyst leygardagin. Eisini hann vann ein tryggan sigur.

Hjá teimum vaksnu vann Gunnar Dahl-Olsen. Tíðliga megnaði Gunnar at slíta seg leysan frá Andrass Joensen, Høgna Øster og øðrum. Gunnar megnaði at halda tørn, men tað var ikki uttan harða kapping frá Andrass Joensen, ið stríddist sum úlvur í skóg, fyri at fáa Gunnar aftur. Høgni Øster gjørdist triðjur á mál.

Tíanverri fyri kappingina - og fyri Sverra sjálvan - punkteraði Sverri Mohr Edvinsson og var tí noyddur at gevast á fjóra av seks umførum.

Næsta kapping verður lýst í fjølmiðlunum og á heimasíðuni hjá Tórshavnar Súkklufelag, www.tsf.fo.

**Úrslit:**

**Dreingir, 6 til 8 ár:**

| Nr. | Navn |
|---|---|
| 1 | Bartal Dam Gregoriussen |
| 2 | Tummas Simonsen |
| 3 | Poul Jóhan á Torvlaðnum |

**Dreingir, 9 til 11 ár:**

| Nr. | Navn |
|---|---|
| 1 | Edmundur W. Johannesen |
| 2 | Tóki Bjarnason Poulsen |

**Gentur, 9 til 11 ár:**

| Nr. | Navn |
|---|---|
| 1 | Durita Toftum Joensen |

**Dreingir, 12 til 14 ár:**

| Nr. | Navn |
|---|---|
| 1 | Benjamin Thomassen |
| 2 | Jørtur Bjarnason Poulsen |
| 3 | Niels Gilstein Midjord |

**Vaksin:**

| Nr. | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Gunnar Dahl-Olsen | 1 t 24 min. 5 sek |
| 2 | Andrass Joensen | 1.25.05 |
| 3 | Høgni Øster | 1.35.06 |
| 4 | Sigmundur Olsson | 1.38.37 |
| 5 | Kári Simonsen | 1.48.45 |
| 6 | Sverri Mohr Edvinsson | DNF |